MIÐFLOKKURIN

hvørt vikuskifti í Sosialinum

- Altjóða sinnaður
- Fjølbroyttur
- Greiður
- Jaligur
- Sterkur

MIÐFLOKKURIN SJÁLVANDI



Dagfinn Høybråten

## Profilurin

**Navn:** Dagfinn Høybråten

**Starv:** Formaður í norska KrF, sum man metast at vera systurflokkur Miðfloksins.

**Um Høybråten:**
Hann hevur verið aktivur í norskum politikki í mong ár, bæði innanflokka og sum ráðharri m.a. í arbeiðara og sosialmálum. Hann býr í Nesodden, og er virkin í samkomu í Norska Misjonsforbundet. Hann hevur universitetsútbúgving innan stats vísind og almanna rætt, og hevur m.a. lisið samfelagsvísund við í USA.

1 januar tók Dagfinn Høybråten við starvinum sum presidentur í norðurlandaráðnum.



**Formenn hittast:**
Herfyri hittust formaður Miðflokksins og Dagfinn Høybråten á fundi í Norska Stórtinginum. Tosað varð um at knýta samband millum flokkarnar báðar, og um mál, sum norski systurflokkurin er kendur fyri m.a. familju økið, menningarsamstarv og fosturverju. Eisini vórðu dagsaktuell mál, sum ynski føroyinga um limaskap í norðurlandaráðnum og EFTA umrødd. Á fundinum bjóðaði Jenis norska floksformanninum á vitjan, og verður hendan vónandi í heyst.

**Visti tú at:**

- verandi ríkisrættarliga støðan, higartil hevur forðað føroyingum sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum?
- limaskapur í EFTA neyvan gerst veruleiki av somu orsøk?
- At skiftandi danskir leiðarar hava gjørt greitt, at ríkisrættarliga støða føroyinga kann broytast, í tí løtu føroyingar ynskja tað?

www.midflokkurin.fo

# Starv á lønarstovuni á Føroya Gjaldstovu

Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Á Gjaldstovuni arbeiða 32 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle Financials. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar: Felags lønarskipan, Búskettskipan, Leiðslukunningarskipan og Dátuvøruhús.

- Lønarstovan hevur um hendi stóran part av almennu lønaravgreiðslunum. Deildin umsitur Felags Lønarskipanina og ráðgevur í at brúka skipanina og nýstovnaðu WEB-løn veitingini.
- Arbeitt verður í løtuni at skipa eina Felags Lønarfyrisiting fyri landið, sum umframt at fyrisita Felags Lønarskipanina fer at fevna um tænastumannaeftirlønir, HR-umsiting og ráðgeving.
- Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan hevur eina flekstíðarskipan, og í Fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

Í løtuni eru 130 brúkarar í Felags Lønarskipanini

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**



**Eitt av starvsfólkum okkara fer í barnsburðarfarloyvi frá 1. juli 2007 til 1. februar 2008 og tí søkja vit eftir fólki at byrja 1. juli ella so skjótt sum til ber.**

**Uppgávurnar eru at:**

- skráseta og málsviðgera lønir
- koyra lønir
- rætta lønir
- bóka lønir
- svara lønarfyrispurningum

Viðkomandi sum situr í starvinum hevur umframt tikið sær av at

- ráðgeva um lønarskipanina
- gera úttrekk úr skipanini
- seta í verk webb-partin av lønarskipanini
- gera úttrekk úr Datavøruhúsi

**Krøv til starvið:** EDV-skipanir stuðla øllum arbeiðinum á gjaldstovuni og tí er tað ein fyritreyt, at tað liggur væl fyri hjá tær at brúka EDV og at seta teg inn í nýggjar loysnir. Ávís útbúgving er ikki kravd, men hevur tú júst lokið HH útbúgvining e.t., so er hetta ein møguleiki. Royndir á lønarøkinum er annar møguleiki. Hevur tú skrivstovuútbúgving/bankaútbúgving er hetta ein upplagdur møguleiki at royna teg á lønarøkinum. Tú skal vera álítandi, røkin og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Starvið er sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett alt eftir útbúgving, royndum og førleika. Meira fæst at vita um starvið frá Guðny Simonsen, sum er at hitta á tlf. 352410 ella 214965.

**Umsókn:** Umsóknir við prógvum og møguliga viðmælum skulu verða send Føroya Gjaldstovu, Traðagøtu 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 29. mai 2007.


Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo





### Arbeiði til raskar ungar hendur í summar

Ung fólk, sum ynskja sær arbeiði í summarfrítíðini, eru vælkomin at venda sær til Vágs kommunu. Kommunan hevur ymiskt fyrifallandi arbeiði, sum skal gerast í summar. So ert tú ung/ur og ikki bangin fyri at arbeiða, ert tú vælkomin at seta teg í samband við umsitingina hjá Vágs kommunu á tel. 37 30 24 áðrenn 8. juni 2007 kl. 16.00.

Vit hava kanska okkurt til tín.

Vágs kommuna
Vágsvegur 22 • 900 Vágur
tlf 37 30 24 • vagur@vagur.fo